LEYSASØLA:

1 KR.

SOSIALURIN

FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐRALAG

NR. 19

MIKUDAGIN
8. MARS 1972

45. ÁRG.

Tá vit fara yvir um ánna

Tað er ikki sjáldan, at nýgjørdir ella ið hvussu er ikki serliga gamlir vegir, verða uppafturgrivnir, tí onkur leiðing ella kápul skal gravast niður í. Serliga hava vit sæð, hvussu hetta hevur verið í Havn og í størri plássum. Í løtuni fara slíkar uppgravingar fram, eitt nú í Sjúrðargøtu, har uppgravingin nú hevur ligið í einar 3 vikur. Her skal nú leggjast nýggjur SEV kaðal, men so er at vóna, at eisini telefonverkið og kommunan taka tjansin, og leggja sínar neyðugu leiðingar í somu gryvt. Tíverri tykist, sum um samarbeiðið millum hesar ymsu stovnarnar ikki altíð er nóg gott, tí tað kann ikki annað enn bera til at allir eru samdir um at leggja niður í undir einum.

Í Eysturoynni, inn móti Lambareiði, har stórt og dýrt vegaarbeiði nú er farið fram í nøkur ár, var at enda komið so langt, at ríkiliga breiður og góður vegur var komin, sum tey koyrandi fróddust um.


Men ikki var hetta arbeiðið meira enn liðugt, so sóu ferðandi, at nú var hin gamli »djevulin« aftur komin. Eitt stórt strekki uppgrivið, sum nýliga var gjørt til veg og asfalterað.

Blaðið hevur fingið fleiri áheitanir um at skriva eitt sindur um hesi óskil, sum sýnist at ráða í hesum landi, ásýniliga einans tí at teir álitismenn, sum landið, kommunur og interkommunala SEV, ikki higartil hava funnið so frægt saman, at teir kunnu gera óneyðug arbeiði til nakað, sum hoyrdi einari plánleysari og »óakademiskari« tíð til.

Við at kanna eftir fáa vit at vita, at tað er ikki telefonverkið, ei heldur SEV, sum grevur uppaftur nýgjørdan veg á Skálafjørðinum, men kommunan, sum nú leggur vatnleiðing. Hetta kundi væl verið gjørt, áðrenn vegurin var gjørdur liðugur. Tað kann væl ikki vera so galið, at telefonverkið, landsverkfrøðingurin, kommunalu myndugleikarnir og SEV ikki eru »uppá talifót«. Um so er, áttu røttu viðkomandi at givið øllum hesum stovnum av grovfilini, tí tað er eingin meining í, at hetta lagið skal halda fram.

Hvussu nógv kostar tað nú ikki Runavíkar kommunu at gera alt hetta arbeiðið, tí teir skulu væl gera vegin aftur og gjalda fyri nýggja asfaltering. Og hvussu nógv hevði kommunan ikki spart, um hon hevði verið vakin og hevði gjørt arbeiðið í samvinnu við landsverkfrøðingin ístaðin fyri sum nú, at arbeiðið allarhelst má vera nógv dýrari enn neyðugt — og hjá einum almennum organi má tað vera avgjørd treyt, at einki arbeiði verður dýrari enn neyðugt er. Ei dáni í, at skattaborgarin mangan gapar og illskast, tá hann sær hvussu ónærisliga verður farið fram.

Hesi ting eru til at taka læru av — og ikki minst í hesum tíðum, nú løgtingið skal leggja nýggja figgjarlóg til rættis og kommunurnar somuleiðis.



Í gjár var dýrdarveður, og nógv vegarbeiði er hjá tí almennu

Peru hevur nógva olju

– siga jarðfrøðingar

Í PERU VILJA GEOLOGAR VERA VIÐ, AT PERU UM 10 ÁR KANN GERAST STØRSTA OLJUFRAMLEIÐANDI LANDIÐ. EIN TÝSKUR UNIVERSITETSPROFESSARI HEVUR SAGT, AT TEIR ÁÐRENN 10 ÁR ERU LIÐIN MØGULIGA KUNNU HAVA EINA DAGSFRAMLEIÐSLU AV 10 MILJ. FØTUM AV RÁOLJU OG ER HETTA LÍKA SO NÓGV SUM FRAMLEIÐSLAN HJÁ USA OG SOVJET ER TILSAMANS

Gerhard Bischoff, dr. og professari sigur, at petroliumsframleiðslan hevði tvífaldað brutto tjóðarproduktið hjá Peru gjøgnum 5 ár. Tað statsrikna oljufelagið Petro Peru, har Bischoff er ráðgevari, hevur funnið olju í teimum tveimum fyrstu royndarholunum, sum eru borað í norðureystur Amazonasøkinum.

Petro Peru hevur gjørt sáttmála við 10 amerikonsk oljufeløg og eitt bretskt felag um framleiðslu av olju í Amazonas-junglinum.

Tey bæði boriholini liggja umleið 1000 km eystanfyri Lima, og framleiðslan er rokn að til 3000 føt fyri hvørt holi. Triðja boringin er nú byrjað.

Peru hevur frammanundan oljuframleiðslu útfyri býnum Talara og á kontinentlásinum uttanfyri útnyrðingsstrondini, har teir fáa 650.000 føt pr. dag. Fyri at røkka brúkið í landinum resta einans 35.000 føt í.

ÍTRØTTUR

Innandurafótbóltur

Seinasta vikuskifti var í ítróttarhøllini í Havn innandurafótbóltkapping við luttøku av 12 liðum, nevnliga 5 úr B.36, 4 úr HB, 2 úr ÍF og 1 úr Mjørkadali.

Leygardagin leikti hesi lið í trimum bólkum, har tvey tey bestu fóru viðari til finaluumfarið sunnudagin, har leikt var allir móti øllum.

Fylgjandi lið leiktu í finaluumfarinum. Úr bólki A: HB 4 (6 stig), Mjørkadal 1 (3 stig). Úr bólki B: HB 2 og HB 3 (bæði 5 stig). Bólkur C: B36 4 og HB 1 (bæði 5 stig). Her komu sostatt 4 lið úr HB, eitt úr B36 og eitt úr Mjørkadali.

Her vóru fleiri hampadystir ímillum m. a. dysturin millum nr. 1 og 2, har HB 2, kanska eitt sindur óvæntað, vann við 2—1 á HB 3. Ein tann besti leikarin í kappingini var Eyðfinnur Lamhauge, HB 2, næst

Framhald á 3. síðu. (1)

Útfluttningurin í januar

kr. 25.454.000,00 móti 15.078.000,00 í fjør

Saltfiskaveiðan í januar mánaða var ialt 509 tons afturímóti 288 tonsum í januar 1971. Undir Íslandi vóru veidd 186 og undir Føroyum 323 tons ímóti í 1971 ávikavist 130 og 288 tons.

Saltfiskaútflutningurin í januar var 2.396 tons fyri kr. 13.554.000. Í januar 1971 var útflutningurin 2.376 tons fyri 9.528.000 kr.

Útflutningurin var í ár til Spania, Italia, Grikkaland og Portugál.

Í sama tíðarskeiði vóru uppskipað 509 tons í Føroyum av saltfiski afturímóti í januar 1971 288 tons.

Útflutningurin av frystum toskaflaki var í januar 1972 757 tons fyri kr. 5.288.000 móti í januar 1971 144 tons fyri kr. 902.000. Hesin útflutningurin fór til USA og ein lítil nøgd til Bretlands.

Av hýsuflaki vóru útflutt 731 tons fyri kr. 5.286.000 — ímóti í januar 1971 491 tons fyri kr. 3.656.000.

Útflutningslondini vóru Bretland, Frakland og USA.

92 tons av upsaflaki vóru útflutt til USA fyri kr. 421.000 afturímóti 84 tonsum fyri kr. 359.000 í januar 1971.

Av svartkalvaflaki vóru útflutt 50 tons fyri kr. 286.000 til USA. Í januar 1971 vóru útflutt til USA 25 tons fyri kr. 131.000 og 5 tons fyri kr. 23.000 til Danmarkar.

Av reyum vóru í januar útflutt 69 tons fyri kr. 770.000 til Danmark, Belgiu, Frakland og Spaniu.

Av jákupsskel vóru útflutt 4 tons fyri kr. 81.000 ímóti 6 tonsum fyri kr. 121.000 í januar 1971.

Av øðrum fiskavørum, kavi, reyðsprøka, skoturava o. ø. vóru útflutt 189 tons fyri kr. 768.000 móti 104 tonsum fyri kr. 358.000 í januar 1971. Útflutningslondini vóru Danmark, USA, Bretland og Frakland.

Samlaði útflutningurin, sigur Fiskasølan frá, var í januar mánaða 1972 1897 tons fyri 12.900.000 fyri frystan fisk. Í januar í fjør var útflutningurin 859 tons fyri 5.550.000. Av nøgdini í ár vóru tey 707 tonsini frá verksmiðjutrolarum fyri kr. 4.660.000.

Sostatt er salt- og feskfiskaútflutningurin fyri januar í ár 25.454.000 krónur afturímóti kr. 15.078.000 í januar 1971. Í tonsatali er útflutningurin ávikavist 4293 og 3.235 tons.

Avlýsing

Umboðsmannavalið, ið er lýst at verða 9. mars 1972, verður við hesum avlýst, av tí at ongi uppskot eru innkomin.

HAVNAR SJÚKRAKASSI.
6. mars 1972.

Silvurbrúdleyp

Í morgin kunnu hjúnini Kirsten og Asbjørn Olsen, Hvalvík, halda silvurbrúdleyp.

Skálaberg

hevði um vikuskiftið fiskað 200 tons.

Aðalfundur

Bókmentafelagið Varðin hevur aðalfund friggjakvøldið 24. mars kl. 20 í Iosjuni.

Fundarskrá sambært lógina.

Nevndin.

TØKK

Fiskepigernes Fagforening takkar fyri gávur, blómur, sangir og fjarrit á 50 ára stovningardegnum.

STJÓRNIN